# Gerðabók - býráðsfundur

**Dagfesting:** 24.02.2022 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084-2

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen, Ólavur Larsen og Gudny Vang

Varalimir:

Ikki møtt: David Andreasen fekk forfall til fundin fyrr í dag.

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 4/22 | 21/00613-7 | Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum v.m. |
| 5/22 | 22/00112-3 | Fuglafjarðar havn - Reglugerð galdandi fyri skip og virkir í sambandi við móttøku ella avskipan av góðsi |
| 6/22 | 22/00029-5 | Nýggjur átaksbilur til tilbúgvingarleiðaran í eini skipan, har bilurin verður skiftur út til nýggjan triðja hvørt ár |
| 7/22 | 22/00128-2 | Eldraráð - eitt samstarv millum Eystur Kommunu og Fuglafjarðar Kommunu |
| 8/22 | 21/00038-2 | Uppskot til starvsfólkapolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu |
| 9/22 | 21/00620-36 | Uppskot til starvsfólkahondbók hjá Fuglafjarðar kommunu |
| 10/22 | 22/00117-3 | Havsbrún søkir um byggiloyvi til luftreinsiskipan til fóðurdeild |
| 11/22 | 21/00432-5 | Dánjal Pauli Højgaard - Umsókn um byggiloyvi til útbyggjan og bilhús , matr. nr. 505a |
| 12/22 | 22/00054-10 | Sp/f Svalir við John David Joensen - Umsókn um grundøkið, matr. nr. 211r, Fuglafjørður, og fyrispurningur um møguleikar fyri bústaðarbygging og íbúðarbygging í Fuglafjarðar Kommunu |
| 13/22 | 21/00246-2 | Vatngoymslutangi_Staðseting á havnalagnum |

1

**4/22**
**21/00613-7 Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum v.m.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.11.2021 | 107/21 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2022 | 1/22 |
| 3 Býráðið | 27.01.2022 | 3/22 |
| 4 Tekniska nevnd | 17.02.2022 | 10/22 |
| 5 Býráðið | 24.02.2022 | 4/22 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
| Stutt lýsing | Tekniska deild og umsitingin hevur í longri tíð arbeiðtt við at forma eina reglugerð galdandi fyri kirkjugarðar í Fuglafjirði og á Hellunum.<br><br>Tað er neyðugt fyri eina kommunu at hava eina galdandi reglugerð fyri kirkjugarðar.<br><br>Í sambandi við viðlíkahald av kirkjugarðinum, so er tað gartnaradeildin, sum varar av hesum. Í sambandi við grevstur av grøv í sambandi við jarðarferðir, hjálpir vegadeildin til við at grava við beltimaskinu.<br><br>Tá kirkjugarðurin verður sligin, so plagar tað at verða fyriskipa soleiðis, at fleiri fólk taka uppgávuna, soleiðis at allur kirkjugarðurin verður sligin í einum.<br><br>**Uppskot til reglugerð**<br>Uppskot til reglugerð inniheldur í høvuðsheitum, hvussu arbeiðið verður skipa í praksis, og hvussu arbeiðið verður skipað við atlitit til kirkjugarðsnevnd, skipan av kirkjugarðinum, mannagongdir í sambandi við jarðarferðir, føring av kirkjubók og tekning, ognarrætt, friðing,setan av kirkjugarðsleiðara, skipan av gravstaði, festibrøv ti gravstað, umsiting av gravstaði, gravsteinar, kirkjugarðsfrið, gjald fyri gravstað við meira.<br><br>Eisini hevur verið tosað um ein kirkjugarðsleiðara, sum hevur ábyrgdina av kirkjugørðunum í Fuglafjarðar kommunu. |

| | |
|---|---|
| | **Digitalisering**<br>Arbeitt verður eisini við at digitaliserað kirkjugarðin við atliti til gravir, har ein digital skipan verður knýtt at staðsetingini av gravum v.m.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 13. januar 2022**<br>Reglugerðin hevur verið til innanhýsis viðmerkingar í umsitingini, og nakrar viðmerkingar eru gjørdar.<br>Reglugerðin er eisini send út til kirkju og samkomur í býnum, og ein felagsfundur verður mánadagin 10. Januar, har reglugerðin verður gjøgnumgingin, og har partarnir í hvør sínum lagi eru bidnir um at koma við viðmerkingum til reglugeðrina.<br><br>Viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum í teknisku nevnd.<br><br>Tekniska nevnd tekur støðu til reglugerðina, og hvørjar viðmerkingar skulu takast við í endaligu reglugerðina, sum verður løgd fyri býráðið til endaliga støðutakan síðst í hesum mánaðinum.<br><br>**Framhald 20. januar 2022**<br>Tann 10. januar í ár hevði kommunala umsitingin fund við umboð fyri kirkjuráð og samkomur í Fuglafirði og har kommununnar teknologur, sum umsitur kirkjugarðarnar í dag og hevur verið við í tilgongdini í arbeiðinum við reglugerðini frá byrjan, gjøgnumgekk uppskot til reglugerð fyri nevndu umboðum.<br><br>Við støði í samtyktini í teknisku nevnd tann 13. januar í ár, har nevndin tók undir við, at seta reglugerðina viðvíkjandi kirkjugørðunum í Fuglafirði og á Hellunum í verk, so hevur kommunustjórin í samráði við borgarstjóran og formannin í teknisku nevnd gjørt nakrar tillagingar í tekstinum í fyriliggjandi uppskoti til reglugerð.<br><br>Tað er ein góð tilgongd í løtuni viðvíkjandi skipan og umsiting av kirkjugørðunum í Fuglafirði og á Hellunum, eisini við atliti at arbeiðinum við at fyrireika eina víðkan av kirkjugarðinum í Fuglafirði. Reglugerðin vil hjálpa til við at hava ein ávísan struktur og formalitet í umsitingini av kirkjugørðunum, sum er eitt týdningarmikið og viðkvæmt øki í kommununi.<br><br>**Framhald 2. februar 2022**<br>Í sambandi við at tekniska nevnd skal viðgera uppskot til reglugerð um kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum aftur, vísandi til samtykt býráðsins tann 27. januar í ár hesum viðvíkjandi, hevur kommunustjórin viðgjørt uppskotið og viðmerkingar til reglugerðina frá Bønhúsnevndini á Hellunum, dagfestar í teldubrævi til kommununa tann 27. januar 2022. Viðmerkingin viðvíkjandi festara (festibræv) í § 8 í reglugerðini, metir kommunustjórin er neyðugt, at hava við í reglugerðini, tí eitt formligt |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">festibræv hevur nakrar skyldur og rættindi við sær í mun til at umsita gravstaðið. Viðmerkingin viðvíkjandi staðseting av byngju í kirkjugarðinum, so er hetta nevnt í § 9, stk. 8 í verandi uppskoti til reglugerð. Týdningarmikið er í hesum sambandi, at tekniska deild skipar so fyri, at byngjur eru staðsettar í kirkjugørðunum í bæði Fuglafirði og á Hellunum.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Ein hjálp til at strukturera og formalisera umsitingina av kirkjugørðunum í Fuglafirði og á Hellunum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Norska Lóg frá 1687 viðvíkjandi kirkjum og kirkjugørðum og lóg frá 1916 om afstaalse af Grund til Kirker og Kirkegaarde.<br>• Fylgiskjøl<br><br>Fundarfrágreiðing, dagfest 10. januar 2022, í sambandi við fund, sum kommunala umsitingin hevði við umboð fyri kirkjuráðið og samkomur í Fuglafirði.<br><br>Uppskot til reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum, sent viðfest teldubrævi, dagfest 19. januar 2022, til Eivin Breiðaskarð, formann í teknisku nevnd, aftaná góðkenning frá Dávur Juul, borgarstjóra.<br><br>• FK j. nr. 21/00613-32 Dagført uppskot til reglugerð viðvíkjandi kirkjugørðum í Fuglafirði og á Hellunum samtykt í teknisku nevnd 17. februar 2022</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við uppskotinum um reglugerð fyri kirkjugarðar í kommununi, og at uppskotið verður sent til hoyringar, ummælis og góðkenningar hjá kirkjuráðnum, áðrenn málið verður lagt fyri býráðið til endanliga støðutakan.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 13. januar 2022<br>Tekniski leiðarin mælir til, at tekniska nevnd ger viðmerkingar til dagførda uppskotið á fundinum, FK j. nr. 21/00613-16, og at uppskotið verður lagt fyri býráðið til endaliga støðutakan.</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Framhald 20. januar 2022**<br>Kommunustjórin mælir til, at býráðið fylgir tilmælinum frá teknisku nevnd og góðkennir fyriliggjandi uppskot til reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum.<br><br>**Framhald 2. februar 2022**<br>Kommunustjórin mælir teknisku nevnd til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum, vísandi til tey viðurskifti, ið eru nevnd í málslýsingini.<br><br>Tekniski leiðarin mælir til, at býráðið tekur undir við uppskotinum til reglugerð, sum var viðgjørt á fundi í teknisku nevnd 17. februar 2022 og samtykt. Víst verður til hjálagda uppskot til reglugerð samtykt í teknisku nevnd, sí FK j. nr. 21/00613-32. |
| Dagf | 11. november 2021./20. januar 2022./2. februar 2022 |



**Tekniska nevnd 11. november 2021:**
Nevndin mælir til, at uppskotið við viðmerkingum um reglugerð galdandi fyri kirkjugarðin í Fuglafirði og á Hellunum verður sent til hoyringar, ummælis og góðkenningar hjá kirkjuráðnum í Fuglafjarðar kirkjusókn, sum er Eileen Ejdesgaard, Marna E. Jensen, Poulina Abrahamsen, Gunnleyg í Garðamørk, Marjun Petersen, Ólavur Poulsen og Súsan Petersen, og hjá elstaráðnum í Siloa, sum eru Ólavur Thomsen, Jógvan Sámalson Jacobsen og Sofus Gregersen. Málið verður síðani lagt aftur í teknisku nevnd til víðari viðgerð.

**Tekniska nevnd 13. januar 2022:**
Nevndin tekur undir uppskotinum um reglugerð við hesum viðmerkingum.
Grein 2:
Kirkjugarðsnevndin hevur fimm nevndarlimir, og verður samansett soleiðis
1: Eitt umboð fyri teknisku nevnd
2: Eitt umboð fyri orku- og umhvørvisnevndini
3: Eitt umboð frá kirkjuni, eitt umboð frá Siloa og eitt umboð frá bønhúsinum á Hellunum.
Grein 12 dettur burtur.

**Býráðið 27. januar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at beinað málið aftur til teknisku nevnd til viðgerðar, fyri at gera smærri tillagingar í reglugerðini, fyri síðani at viðgera málið aftur á fyrstkomandi býráðsfundi tann 24. februar 2022.

**Tekniska nevnd 17. februar 2022:**
Nevndin samtykti at gera broytingar í reglugerðini fyri kirkjugarðar í Fuglafirði og á Hellunum, sí FK j. nr. 21/00613-32.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og góðkenna reglugerðina fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**5/22**
**22/00112-3 Fuglafjarðar havn - Reglugerð galdandi fyri skip og virkir í sambandi við móttøku ella avskipan av góðsi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 11.02.2022 | 9/22 |
| 2 Býráðið | 24.02.2022 | 5/22 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
| Stutt lýsing av málinum | Havnastjórin hevur saman við tilbúgvingarleiðaranum og teknisku deild gjørt eitt uppskot til reglugerð fyri skip og virkir í ambandi við móttøku ella avskipan av góðsi. Víst veðrur til hjálagda uppskot, FK j. nr. 22/00112-1.<br>Umsitingin hevur gjøgumgingið uppskot til reglugerð, sum eisini eigur at fata um bæði tað, sum nú stendur í uppskotinum um rudding v.m., men eisini viðvíkjandi larmi í sambandi við lossing og lasting yvirhøvur, eisini tá talan er um grót. Tað vil siga, at í reglugerðini stendur eisini skrivað, nær á degnum – eitt nú frá kl. 07:00 á morgni til kl. 22:00 - tað er loyvt at lossa og lasta yvirhøvur.<br><br>Vinnu- og havnanevndin skal taka støðu til uppskot til reglugerð, og koma við møguligum ískoyti, sum síðani verður kjølfest politiskt, fyrst í vinnu- og havnanevndini, og síðani í býráðnum, har næsti fundur er 24. februar 2022.<br><br>Áðrenn býráðsfundin, verður tosað við við viðkomandi aktørar og kunna teir um innihaldið í tí reglugerð, sum er ávegis.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 24. februar 2022**<br>Málið var fyri í vinnu- og havnanevndini 11. Februar, har rættingar vóru gjørdar. Nevndin samtykti at rætta enska tekstin samsvarandi tann føroyska. Tilbúgvingarleiðarin hevur rætta tann enska tekstin. Víst verður til FK j. nr. 22/001112-5.<br>Býráðið skal nú taka støðu til reglugerðina. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | At fáa eina reglugerð fyri Fuglafjarðar havn í sambandi við móttøku og avskipan av góðsi galdandandi fyri skip og virkir. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Uppskot til reglugerð fyri skip og virkir í sambandi við móttøku og avskipan av góðsi<br>• **Møgulig fylgiskjøl** |

7

| | | | |
|---|---|---|---|
| | FK j. nr. 22/00112-1 Ruls and regulations við viðmerkingum frá tilbúgvingarleiðaranum<br>FK j. nr. 22/00112-5 Ruls and regulations_Rættingar frá vinnu- og havnanevndini 11. februar og umseting til enskt mál av tilbúgvingarleiðaranum | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til reglugerð, og at vinnu- og havnanevndin ger møguligar viðmerkingar til verandi uppskot at leggja til býráðið til endaliga góðkenning. Áðrenn býráðsfundin verður reglugerðin koyrd til hoyringar hjá viðkomandi aktørum.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 24 februar 2022**<br>Tekniski leiarin mælir býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi reglugerð, sum vinnu- og havnanevndin hevur gjørt rættingar til, har tilbúgvingarleiðarin hevur rætta enska tekstin til samsvarandi tann føroyska tekstin. Víst verður til FK j. nr. 22/00112-1. | | |
| Dagf | 11. ferbuar 2022. | | |



**<u>Vinnu- og havnanevndin 11. februar 2022:</u>**
Nevndin hevur gjørt viðmerkingar til reglugerð, og biður umsitingina um at skriva rættingina á enskum máli.

**<u>Býráðið 24. februar 2022:</u>**
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og góðkenna reglugerð um móttøku og avskipan av góðsi.

**6/22**
**22/00029-5 Nýggjur átaksbilur til tilbúgvingarleiðaran í eini skipan, har bilurin verður skiftur út til nýggjan triðja hvørt ár**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.01.2022 | 6/22 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 17.01.2022 | 4/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 5/22 |
| 4 Býráðið | 27.01.2022 | 2/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.02.2022 | 8/22 |
| 6 Tekniska nevnd | 17.02.2022 | 15/22 |
| 7 Býráðið | 24.02.2022 | 6/22 |

**Tilráðing**



| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Átaksbilurin hjá Fugjaflarðar Sløkkiliði, Ford F-350, er blivin 10 ára gamal og blivin óálítandi.<br>Málið er komið hartil, at átaksleiðarin er ikki tryggur við støðuna at koyra í einum bili, sum ikki er álítandi. Bilurin hevur tað við at steðga upp undir koyring upp til fleiri ferðir á einum túri.<br>Átaksleiðarin hevur í eina tíð víst á trupulleikan.<br>Bilurin hevur verið fleiri ferð á vekstað uttan at tað hevur givið úrslit. Ein síðsta roynd varð gjørd beint undan jólum, har mett varð at finna feilin, men uttan úrslit. Bilurin fekk umvælt bremsur og onnur viðlíkahaldsumvælingar, men motorurin hevur sama feil, at hann steðgar undir koyring.<br>Formaðurin í teknisku nevnd hevur tosað við teknisku nevnd um at taka málið upp til viðgerðar í nevndi, fyri at finna eina loysn á verandi fíggjarætlan fyri 2022 á øki 6. Eisini hevur hann tosað við formannin í vinnu- og havnanevndini fyri at finna pening á verandi játtan fyri 2022 á øki 7.<br>Ein nýggjur átaksbilur kostar umleið kr. 600.000,-. Møguleiki er fyri at keypa bilin eftir einum fíggjarleisti, sum aðrar kommunur eisini brúka, har bilurin verður keyptur sum eingangsíløga, men verður skiftur út triðja hvørt ár uttan nýggja íløgukostnað. Tá bilurin verður latin inn aftur fyri ein nýggjar, so verður hann eftirhugdur, soleiðis at hann er í góðum standi. |

| | |
|---|---|
| | Neyðugt er at hava ein góðan og tryggan átaksbil, sum er fýrahjólstrektur og góður í vindi. Neyðugt er ofta at fara upp í hæddirnar so sum Gøtueiði og til Hellurnar og Oyndarfjørð.<br><br>Tekniska deild er sett á uppgávuna at finna pening á verandi íløgujáttan fyri fíggjarárið 2022.<br>Møguleiki er fyri at flyta kr. 150.000 av íløgukontoini fyri nýgerð av kloakkum, kr. 100.000,- av íløgukontoini fyri nýgerð av vegum, og kr. 150.000,- av íløgukontoini fyri útstykkingarætlan á Kambsdali.<br>Restfíggingin á kr. 200.000,- kann møguliga finnast á øki 7.<br>Ætanin er ikki at biðja um eina eykajattan, men at finna peningin á verandi fíggjarætlan fyri fíggjarárið 2022.<br><br>Nevndin skal taka støðu til uppskotið til fíggingarleist.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 17. januar 2022**<br>Málið hevur verið í teknisku nevnd til viðgerðar 14. Januar 2022. Nevndin samtykti at finna kr. 300.000,- av øki 7 fyri 2022, treytað av at vinnu og havnanevndin fíggjar írestandi peningin.<br>Tilbúgvingarleiðarin arbeiðir við at heinta tilboð inn uppá átaksbilin.<br><br>**Framhald 18. januar 2022**<br>Tekniska nevnd og vinnu- og havnanevndin mæla býráðnum til – umvegis fíggjarnevndina – at samfíggja nýggjan átaksbil til sløkkiliðið, tí verandi átaksbilur steðgar upp við jøvnum millumbilum, sum ikki er ein haldbar støða hjá tilbúgvingarleiðaranum.<br><br>Talan er um eina samfígging á økjunum 6 og 7, 300 tús. kr á hvørjum øki, ein íløga á umleið 600 tús. kr.<br><br>Tá talan er um eina samfígging, sum ikki er játtan til, og talan ikki er um eina eykajáttan, so má býráðið – umvegis fíggjarnevndina – góðkenna fíggingina sambært §§ 40 og 41 í kommunustýrislógini, sum eru soljóðandi:<br><br>**§ 40.** Tá fíggjarætlanin er endaliga samtykt, verður eisini útskrivingin av kommunuskattinum fyri komandi árið samtykt við fíggjarætlanini sum grundarlag. Samtykta fíggjarætlanin er á sama hátt bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarárið.<br><br>**§ 41.** Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleika. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.<br><br>Tá játtanin í sambandi við hetta keyp av átaksbili ikki er fingin til vega, so má býráðið taka endaliga støðu til – umvegis avvarðandi nevndir og |

| | |
|---|---|
| | fíggjarnevnd – um átaksbilurin kann samfíggjast av nevndu økjunum 6 og 7.<br><br>Tekniska nevnd hevur játtað, at fíggjað átaksbilin av nøkrum íløgukontum á økið 6, eitt nú íløgukontum til nýgerð av kloakkum, vegum og útstykkingarætlanini á Kambsdali. Vinnu- og havnanevndin hevur játtað, at fíggjað átaksbilin á íløgukontu 751 hjá Fuglafjarðar havn.<br><br>**Framhald 19. januar 2022**<br>Fíggjarnevndin hevur á fundi í dag samtykt, at mæla býráðnum til at fylgja tilmælunum frá teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini, at samfíggjað íløgu til nýggjan átaksbil til sløkkiliðið av økjunum 6 og 7 til ein kostnað á umleið kr. 600.000,-<br>Tilbúgvingarleiðarin hevur innheintað tilboð frá trimum bilforhandlarum, ávikavist Wenzel, Waag og Bilasøluni. Tilboðini eru hesi v/6,25 % mvg.<br><br>**Viðmerking**<br>Tilboðsprísirnir eru uttan ljós, ljóð, klistur og verardekk við tilhoyrandi felgum<br><br>• Volvo XC90 áljóðandi **kr. 484.500 v/6,25 % mvg**<br>• Mercedes GLE áljóðandi **kr. 547.188 v/6,25 % mvg**<br>• VW Touareg áljóðandi **kr. 632.188 v/6,25 % mvg**<br><br>**Framhald 5. februar 2022**<br>Síðani býráðið viðgjørdi og samtykti samfíggingina av átaksbilinum á fundi tann 27. januar í ár, hevur fíggjareiðarin víst á formalitetin við at talan er um eina eykajáttan, hóast fígging er tøk á øðrum økjum til endamáli, sum krevur 2 viðgerðir av býráðnum sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini. Fíggjarmálaraðið er samt í hesum. Tí verður hetta mál, sum var væl lýst og viðgjørt á seinasta býráðsfundi, umvegis fíggjarnevndina, lagt fram fyri býráðið til 2. viðgerð tann 24. februar í ár.<br><br>**Framhald 16. februar 2022**<br>Fíggjarnevndin samtykti á fundi í gjár 15. februar, at mæla býráðnum til við 2. viðgerð, at góðkenna samfíggingina av átaksbilinum; men at tekniska nevnd áðrenn býráðsfundin nágreinar av hvørjum kontum á økið 6, at fíggingin av átaksbilinum skal verða.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 17. februar 2022**<br>Møguleiki er fyri at fíggja kr. 100.000,- av íløgukontoini fyri nýgerð av vegum, RS 671, og kr. 200.000,- av íløgukontoini fyri útstykkingarætlan á Kambsdali, RS 633.<br><br>**Ískoyti til fundin í býráðnum 24. februar 2022** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Málið um keyp av nýggjum varð viðgjørt í teknisku nevnd 17. Februar 2022, har samtykt varð at fíggja kr. 100.000 av íløgukontoinin fyri nýgerð av vegum, RS 671, og at fíggja kr. 200.000,- av íløgukontoini fyri útstykking á Kambsdali, RS 633.<br>Býráðið skal taka støðu til, um tikið verður undir við samtyktini í teknisku nevnd tann 17. februar, og samtyktini í vinnu- og havnanevndini 17. Januar 2022, har samtykt varð at fíggja kr. 300.000,- av íløgukontoini fyri íløgur fyri havnaøkið, RS 751.<br>Tað talan er um samfígging, so er neyðugt at málið verður viðgjørt tvær reisur í býráðnum. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Keyp av nýggjum átaksbili til sløkkiliðið í Fuglafjarðar kommunu, nú tann gamli átaksbilurin ikki er álítandi longur sum átaksbilur. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 22/00029-1 Áheitan frá formanninum í teknisku nevnd um at kanna møguleikan fyri at finna fígging á verandi íløgujáttan fyri fíggjárárið 2022 til nýggjan átaksbil til tilbúgvingarleiðarin og sløkkiliðsstøðina<br>FK j. nr. 22/00029-10 P/F Wenzel – Tilboð uppá ein Volvo XC90 áljóðandi kr. 456.000 u/mvg<br>FK j. nr. 22/00029-11 P/F Waag – Tilboð uppá ein Mercedes GLE áljóðandi kr. 515.000 u/mvg<br>FK j. nr. 22/00029-12 P/f Bilasølan – Tilboð uppá ein VW Touareg áljóðandi kr. 595.000 u/mvg | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin metir málið at hava skund, og mælir til at finna kr. 400.000,- á øki 6 fyri íløgujáttanni fyri 2022, og finna restfíggingina á øki 7.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 17. januar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir til at fíggja írestandi pening av øki 7 fyri 2022, og at málið verður endaliga viðgjørt í býráðnum umvegis fíggjarnendina.<br><br>**Framhald 19. januar 2022**<br>Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at fylgja tilmælunum frá ávíkavist teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini, og mæla | | |

| | |
|---|---|
| | býráðnum til at góðkenna eina samfígging á økjunum 6 og 7 í sambandi við keyp av nýggjum átaksbili til sløkkiliðið.<br><br>**Framhald 5. februar 2022**<br>Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at mæla býráðnum til at góðkenna eykajáttanina viðvíkjandi keyp av átaksbili til sløkkiliðið í sambandi við 2. viðgerð av málinum í sambandi við býráðsfundin tann 24. februar í ár.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 17. februar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir til at fíggja kr. 100.000 av íløgukontoinin fyri nýgerð av vegum, RS 671, og at fíggja kr. 200.000,- av íløgukontoini fyri útstykking á Kambsdali, RS 633.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 24. februar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 17. februar um at fíggja kr. 100.000,- av íløgukontoini fyri nýgerð av vegum, RS 771, og fíggja kr. 200.000,- av íløgukontoini fyri útstykking á Kambsdali, RS 633, og at taka undir við samtyktini í vinnu- og havnanevndini 17. Januar um at fíggja kr. 300.000,- av íløgukontoini fyri nýgerð av havnum, RS 751. |
| Dagf | 11. januar 2022/13. januar 2022/19. januar 2022/5. februar 2022 |



**<u>Tekniska nevnd 13. januar 2022:</u>**
Nevndin samtykti at játta kr. 300.000,- av øki 6, treytað av, at kr. 300.000,- eisini verða játtaðar av øki 7, og at málið verður endaliga viðgjørt í býráðnum.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 17. januar 2022:</u>**
Nevndin samtykti at fíggja kr. 300.000,- av íløgukontoini RS 751.

**<u>Fíggjarnevndin 19. januar 2022:</u>**
Fíggjarnevndin samtykti, at tilmæla býráðnum at fylgja tilmælunum frá teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini, at samfíggjað íløgu til nýggjan átaksbil til sløkkiliðið av økjunum 6 og 7 til ein kostnað á umleið kr. 600.000,-

**Býráðið 27. januar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælunum frá avvarðandi nevndum og fíggjarnevndini til at samfíggjað íløgu til nýggjan átaksbil til sløkkiliðið av økjunum 6 og 7 á fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2022:**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til við 2. viðgerð, at góðkenna samfíggingina av átaksbilinum, og ynskir at tekniska nevnd áðrenn býráðsfundin nágreinar av hvørjum kontum á økið 6, at fíggingin av átaksbilinum skal verða.

**Tekniska nevnd 17. februar 2022:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og fíggja kr. 100.000 av íløgukontoinin fyri nýgerð av vegum, RS 671, og at fíggja kr. 200.000,- av íløgukontoini fyri útstykking á Kambsdali, RS 633 í sambandi við keyp av nýggjum átaksbili.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (8-0) við 2. viðgerð, at fylgja tilmælunum frá teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini at samfíggja ein nýggjan átaksbil til sløkkiliðið, sum verður fíggjað av økjunum 6 og 7, ávíkavist kr. 100.000,- av íløgukontuni 671, kr. 200.000,- av íløgukontuni 633 umframt kr. 300.000,- av íløgukontuni 751.

## 7/22
## 22/00128-2 Eldraráð - eitt samstarv millum Eystur Kommunu og Fuglafjarðar Kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 29.11.2021 | 40/21 |
| 2 Býráðið | 16.12.2021 | 57/21 |
| 3 Sosiala nevnd | 07.02.2022 | 1/22 |
| 4 Býráðið | 24.02.2022 | 7/22 |



### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala Nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er ásett í §6<br><br>*«§6. Kommunurnar skulu tryggja, at borgarar í størst møguligan mun hava møguleika at verða hoyrdir, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum.<br>stk. 2, komunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast.»*<br><br>Leiðslan í Nánd metir, at tørvur er á einum eldraráð, og at eitt eldraráð mest skynsamt verður sett á stovn í einum samstarvi ímillum Fuglafjarðar Kommunu og Eysturkommunu.<br><br>Umhvørvis- og trivnaðarnevndin í Eysturkommunu hevur ummælt máli á fundi í maj 2021, og samtykti, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við málinum, og koma við einum uppskoti til viðtøkur v.m. at leggja fyri nevndina. Onki er hent í málinum fyrr enn nú, tí bíða hevur verið eftir nýggjum sosialdeildarleiðara í Fuglafjarðar Kommunu, sum kundi samstarva við Eysturkommunu og Nánd um málið.<br><br>Fyrisitingin í Nánd, Eysturkommunu og Fuglafjarðar Kommunu hava nú orða eitt uppskot til viðtøkur fyri eitt komandi eldraráð.<br><br>Vert er at leggja til merkis, at eitt eldráð kann brúkast sum eitt ráðgevandi organ hjá kommununum og hjá Nánd. Ráðið kann eisini av sínum eintingum siga kommununum/nánd sína hugsan um eitthvørt |

| | |
|---|---|
| | evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar. Talan kann tá verða um mál, sum liggja uttanfyri yrkisøkið hjá Nánd. Dømir uppá hettar er uppskot um eldrabústaðir ella uppskot sum handla um reingerð.<br><br>Í uppskotinum til viðtøkur fyri eitt komandi eldraráð verður mælt til, at val til eldraráðið er 4. hvørt ár í sambandi við kommunustýrisvalið. At íbúgvarnir í hvørjari kommunu velja síni umboð til eldraráðið og at hvør kommuna fær 3 umboð.<br><br>Fyrisitingin leggur upp til, at fyrsta val til eldraráð verður skipað áðrenn næsta kommunustýrisval, og at fyrsta seta tí verður styttri enn 4 ár, og at val til eldraráð hereftir verður samstundis sum val til kommunustýrið.<br><br>**Viðgerð á Býráðsfundi 16. Desember 2021**<br>Á fundi í Sosialu nevnd 29. november 2021 samtykti Sosiala nevnd at leggja uppskot fram fyri Fuglafjarðar Býráð um at seta á stovn eldraráð saman við Eysturkommunu.<br><br>Uppskotið til viðtøkur fyri eldraráð bleiv umrøtt. Sosiala nevnd legði upp til at broyta viðtøkurnar so borgarar, sum valdagin hava fylt 60 ár hava valbærið. Í uppskotinum var lagt upp til at borgarar sum valdagin hava fylt 18 ár høvdu valbærið.<br><br>Harafturat ynskti Sosiala nevnd at broyta §6 stk. 2 so tað framgongur av viðtøkunum, at samsýning hægst kann gevast fyri 12. fundir árliga.<br><br>Í Eysturkommunu hevur viðgerðin av uppskotinum verið fyri í Trivnaðarnevndini og á býráðsfundinum í november. Uppskotið bleiv samtykt uttan broytingar.<br><br>**Viðgerð á fundi í Sosialu nevnd 7. Februar 2022**<br>Á býráðsfundi tann 16. desember 2021 samtykti býráðið einmælt at fylgja tilmælinum frá Sosialu nevnd, og góðkendi, at gera samstarvsavtalu við Eysturkommunu um at skipað eitt eldraráð. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at Sosiala nevnd kannar, um tað er møguligt, at ein limur í eldraráðnum úr hvørjum øki er undir 60 ár.<br><br>**Til kunningar á býráðsfundi 24. februar 2022**<br>Sosiala nevnd hevur kannað, um tað er møguligt, at ein limur í eldraráðnum úr hvørjum øki er undir 60 ár. Tað er bert møguligt, um hvørt økið ger tveir vællistar. Ein lista fyri vælevni yvir 60 ár og ein listi fyri vælevni undir 60 ár. Sosiala nevnd metir ikki at |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">hettar er ein ráðilig loysn. Sosiala nevnd avgjørdi tí at halda fast í upprunaligu avgerðini um at vælbærið er 60 ár og eldri.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Málið verður tikið upp eftir ynski frá fyrisitingini í Nánd</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt Løgtingslóg nr. 19. frá 7. apríl 2014 um heimatænastum eldrarøkt v.m.<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Uppskot til viðtøkur fyri eitt komandi eldraráð</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td>Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td></td><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td></td><td>Umsitingarligar</td><td>Nei</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Fundur í Sosialu nevnd 29. november 2021<br>Mælt verður til at:<br><br>1) Sosiala nevnd tekur støðu til, um Fuglafjarðar Kommuna skal seta eitt eldraráð á stovn saman við Eysturkommunu<br><br>Um ja:<br><br>2) At Sosiala nevnd tekur støðu til uppstotið til viðtøkur fyri eldraráðið.<br><br>3) At Sosiala nevnd fylgir tilmælinum frá fyrisitingini um at seta á stovn eldraráð áðrenn næstkomandi kommunustýrisval, og at fyrsta seta í eldraráðnum tí verður styttri enn 4 ár.<br><br>Býráðsfundur 16. desember 2021<br>Mælt verður til at:<br><br>1) býráðið tekur støðu til, um Fuglafjarðar Kommuna skal seta eitt eldraráð á stovn saman við Eysturkommunu<br><br>Um ja:<br><br>2) At Býráðið tekur støðu til uppskotið til viðtøkur fyri eldraráðið.<br>Herundir eisini broytingaruppskotini frá Sosialu nevnd</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | 3) At Býráðið fylgir tilmælinum frá Sosialu nevnd um at seta á stovn eldraráð áðrenn næstkomandi kommunustýrisval, og at fyrsta seta í eldraráðnum tí verður styttri enn 4 ár.<br><br>**Fundur í Sosialu nevnd 7. Februar 2022**<br>Sosiala nevnd tekur støðu til, um tað er møguligt, at ein limur í eldraráðnum úr hvørjum øki er undir 60 ár.<br><br>**Fundur í býráðnum 24. februar 2022**<br>Mælt verður til, at býráði tekur kunningina frá Sosialu nevnd til eftirtektar |
| Dagf | 18. november 2021,<br>7. Desember 2021<br>3. Januar 2022 og<br>11. Februar 2022 |



**Sosiala nevnd 29. november 2021:**
Sosiala nevnd tekur undir við at seta Eldraráð á stovn saman við Eysturkommunu

Sosiala nevnd ynskti at broyta valbærið soleiðis at limirnir í eldraráðnum eru 60 ár og eldri (§5 stk. 2)

Sosiala nevnd ynskir at broyta §6 stk. 2. so tað framgongur, at samsýning max kann gevast fyri 12 fundir árliga.

Sosiala nevnd fylgir tilmælinum um at seta á stovn eldraráð áðrenn næstkomandi kommunustýrisvæl, og at fyrsta seta í eldraráðnum tí verður styttri enn 4 ár.

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd, og góðkendi at gera samstarvsavtalu við Eysturkommunu um at skipað eitt Eldraráð, har Nánd er fakligi myndugleikin á økinum. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at sosiala nevnd kannar, um tað er møguligt, at ein limur í eldraráðnum úr hvørjum øki er undir 60 ár.

**Sosiala nevnd 07. februar 2022:**
Sosiala nevnd hevur viðgjørt um møguleiki er fyri, at ein av limunum í eldraráðnum í hvørjum økið er undir 60 ár. Nevndin metir ikki, at tað er praktiskt at arbeiða við tveimum

aldursbýttum listum. Tí ynskti nevndin, at halda fast við, at limirnir í eldraráðnum skuldu verða 60 ár fyri at verða valbarði.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd, og ásetti valbærið til eldraráðið í samstarvinum millum Fuglafjarðar kommunu og Eysturkommunu til at verða 60 ár.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**8/22**

## 21/00038-2 Uppskot til starvsfólkapolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2021 | 3/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2022 | 6/22 |
| 3 Býráðið | 24.02.2022 | 8/22 |

20

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur í samráði við borgarstjóran gjørt uppskot til starvsfólkapolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu, sum er yvirskipaður í mun til eina meira ítøkiliga starvsfólkahondbók, sum tað eisini verður arbeitt við í løtuni.<br><br>Fíggjarnevndin er starvsfólkanevndin hjá Fuglafjarðar býráð, tí er tað fyrst fíggjarnevndin, ið viðger uppskotið fyri síðani at gera tilmæli til býráðið, sum endaliga góðkennir starvsfólkapolitikkin.<br><br>Starvsfólkapolitikkurin hevur til endamáls at tryggja, at starvsfólk hava góð og trygg arbeiðspláss í kommununi; soleiðis at kjarnu-uppgávur verða loystar úrslitagott til gagns fyri borgarar, fyritøkur, stovnar og áhugafelagsskapir.<br><br>Uppskoti til starvsfólkapolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu, sum tekur støði í starvsfólkapolitikkinum hjá landinum, inniheldur 5 økir, sum eru hesi:<br><br>1. Arbeiðsumhvørvispolitikk<br>2. Setanar- og uppsagnarpolitikk<br>3. Førleikamenningarpolitikk<br>4. Familjupolitikk<br>5. Eldrapolitikk<br><br>Borgarstjórin hevur ynski um at arbeiða miðvíst við politikkum í føstu nevndunum hjá Fuglafjarðar býráð, eisini starvsfólkapolitikki; tí verður hetta uppskotið nú lagt fram fyri fíggjarnevndina til umrøðu og víðari viðger, eisini á einum seinni fundi, soleiðis at miðja verður ímóti, at býráðið kann góðkenna starvsfólkapolitikkin í vár.<br><br>**Framhald 7. februar 2022** |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Í januar í fjør varð uppskot um starvsfólkapolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu viðgjørt í fíggjarnevndini. Síðani hevur málið ligið eitt sindur á láni til í fjør heyst, tá starvsfólkapolitikkurin varð viðgjørdur aftur í umsitingini í sambandi við at arbeiðið við uppskoti til starvsfólkahondbók varð tikið upp aftur og eisini viðgjørt á fundinum í fíggjarnevndini 14. februar.<br><br>Starvsfólkapolitikkurin er yvirskipaður og liggur til grund fyri tí meira ítøkiligu starvsfólkahondbókini, sum hevur mannagongdir við rætindum og skyldum, ið starvsfólk hjá kommununi kunnu virka út frá í dagligdegnum<br><br>Síðani viðgerðina av uppskotinum til starvsfólkapolitikk í fjør, hevur umsitingin tillagað skjalið eitt sindur og lagt 2 økir afturat politikkinum, sum eru rúsevna- og roykipolitikkir. Tey 7 politikkøkini eru nevnd, tí tey síggjast beinleiðis aftur við ítøkiligum mannagongdum í starvsfólkahondbókini.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Skapa góð og trygg arbeiðspláss í Fuglafjarða kommunu, har starvsfólk trívast og mennast soleiðis at borgarar, fyritøkur og áhugapartar annars fáa bestu tænastu og kommunan er í einari støðugari menning.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Kommunustýrislógin<br>Arbeiðsumhvørvislógin<br>Fyrisitingarlógin<br>Starvsfólkapolitikkur hjá landinum<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Uppskot til starvsfólkapolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu, dagfest 7. februar 2022</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Nei</td><td>Møguliga</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Eftir at uppskoti til starvsfólkapolitikk er viðgjørt í leiðslubólkinum í umsitingini, mæla borgarstjórin og kommunustjórin til, at fíggjarnevndin viðger uppskotið á komandi fundum, og leggur uppskotið fyri býráðið í vár til endaliga góðkenning.<br><br>Framhald 7. februar 2022</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at mæla býráðnum til, at góðkenna fyriliggjandi uppskot til starvsfólkapolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Framhald 19. februar 2022**<br>Kommunustjórin mælir býráðnum til at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, um at góðkenna yvirskipaða uppskot til starvsfólkapolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu, sum starvsfólkahondbókin er kjølfest í. |
| Dagf | 18. januar 2021/7. februar 2022 |

**Fíggjarnevndin 20. januar 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum og kommunustjóranum um at fíggjarnevndin og umsitingin arbeiðir víðari við einum starvsfólkapolitikki, sum verður lagdur fyri býráðið til endaliga góðkenning seinni í vár.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2022:**
Fíggjarnevndin samtykti, at uppskotið til starvsfólkapolitikk verður lagt fyri býráðið saman við uppskotið til starvsfólkahondbók.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkendi starvsfólkapolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu.

## 9/22
## 21/00620-36 Uppskot til starvsfólkahondbók hjá Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2022 | 7/22 |
| 2 Býráðið | 24.02.2022 | 9/22 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini. |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Upprunaliga uppskotið til hesa starvsfólkahondbók varð gjørt av uttanhýsis leiðsluráðgeva í samstarvi við leiðslubólkin í umsitingini. Uppskotið varð ikki liðugt. Tí er hondbókin ment víðari við kommunustjóranum sum toghaldara, og nú í seinastuni við hjálp frá sosialdeildarleiðaranum í sambandi við liðugtgerð av starvsfólkahondbókini.<br><br>Starvsfólkahondbókin, sum er kjølfest í einum yvirskipaðum starvsfólkapolitikki og starvsfólkapolitikkinum hjá landinum, hevur til endamáls, at avstemma væntanir millum Fuglafjarðar kommunu og starvsfólkini innan viðkomandi evni; og hevur ein felags leist og mannagongdir, sum øll skulu fylgja. Starvsfólkahondbókin skal eisini virka sum eitt hjálpiamboð hjá øllum starvsfólkum í kommununi. Ætlanin er, at brúka starvsfólkahondbókina sum eitt uppslagsverk í gerandisdegnum, soleiðis at starvsfólkini í kommununi á henda hátt kunna fáa greiðu á ymiskum spurningum.<br><br>Starvsfólkahondbókin hevur verið til hoyringar hjá leiðslubólkinum í umsitingini, flestu rakstrar- og stovnsleiðslum og |
| | álitisfólkaumboðum, sí viðfesta skjal, har viðmerkingarnar í sambandi við hoyringssvarini eru sett inn í starvsfólkahondbókina.<br><br>**Framhald 19. februar 2022**<br>Við støði í viðgerðini av uppskotinum til starvsfólkahondbók á fundi í fíggjarnevndini tann 15. februar 2022, ynskti nevndin at hittast aftur, tá starvsfólkahondbókin var tillagað tær viðmerkingar, sum vóru komnar í sambandi við hoyringssvarini. Umsitingin gjørdi neyðugar tillagingar í starvsfólkahondbókini, og fíggjarnevndin hittist aftur á fundi í gjár 18. februar kl. 13:30-16:00, har umsitingin gjøgnumgekk starvsfólkahondbókina, og har |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | fíggjarnevndin gjørdi neyðugar tekst- tillagingar og síðani góðkendi fyriliggjandi uppskot til starvsfólkahondbók fyri Fuglafjarðar kommunu.<br><br>Umsitingin sendir í vikuni starvsfólkahondbókina til rættlestur. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ynski um, at starvsfólk hjá Fuglafjarðar kommunu verða viðgjørd líka, tá ræður um starvsviðurskifti á arbeiðsplássinum. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Starvsfólkapolitikkurin hjá Fuglafjarðar kommunu**<br>**Starvsfólkapolitikkur hjá landinum**<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Fyrisitingarlógin**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til starvsfólkahondbók hjá Fuglafjarðar kommunu, januar/februar 2022, saman við viðmerkingum í sambandi við hoyringssvarini** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nakað |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nakað |
| Tilmæli | Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at fíggjarnevndin samtykkir, at mæla býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til starvsfólkahondbók til at fáa gildi tann 1. mars 2022; og í hesum sambandi heimilar umsitingini, at gera neyðugar broytingar og/ella tillagingar við atliti at teimum viðmerkingum, sum eru komnar í sambandi við hoyringssvarini.<br><br>**Framhald 19. februar 2022**<br>Kommunustjórin mælir býráðnum til at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna fyriliggjandi uppskot til starvsfólkahondbók hjá Fuglafjarðar kommunu til at fáa gildi tann 1. mars 2022. | | |
| Dagf | 10. februar 2022 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Fíggjarnevndin 15. februar 2022:**
Jónhild Abrahamsen, sosialdeildarleiðari, luttók til hetta pkt. á skránni og svaraði spurningum, ið fíggjarnevndin hevði. Fíggjarnevndin samtykti, at umsitingin ger neyðugar tillagingar í starvsfólkahondbókini í mun til tær viðmerkingar, sum eru komnar í sambandi við hoyringssvarini, soleiðis at fíggjarnevndin kann leggja eina lidnað starvsfólkahondbók fyri býráðið á komandi fundi 24. februar.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna starvsfólkahondbókina hjá Fuglafjarðar kommunu.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

# 10/22
# 22/00117-3 Havsbrún søkir um byggiloyvi til luftreinsiskipan til fóðurdeild

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 11.02.2022 | 11/22 |
| 2 Býráðið | 24.02.2022 | 10/22 |

## Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndin. |
| Stutt lýsing av málinum | Havsbrún hevur fingið prinsippielt byggiloyvi til Fóðurlinju 3, Víst verður til FK j. nr. 20/00338.<br><br>Fuglafjarðar kommuna hevur í gjár, 9. februar 2022, móttikið umsókn frá P/f Havsbrún um prinsipielt byggiloyvi tilhoyrandi tilfari og visualisering í sambandi við, at tvey vaskitorn og ein skorsteinur skulu setast upp til eina reinsiskipan av luftútlátinum frá verandi fóðurframleiðlsu á matr. nr. 239a, frammanfyri matr. nr. 239t, har 8 rávørusiloir standa.<br><br>**Fýra visualiseringsmyndir eru gjørdar**<br>1. Frá Thabor<br>2. Frá Mentanarhúsi (Camping)<br>3. Dronumynd vestanífrá<br>4. Omanfyri Jólavíkina<br><br>Reinsiskipanin verður staðsett sunnanvert verandi silobattaríir.<br><br>Í sambandi við umsókn um byggiloyvi til reinsiskipanina viðv. luktdálking, hevur fundur verið í býráðssalinum, har Havsbrún kunnaði Fuglafjarðar kommunu um reinsiskipanina.<br>Havsbrún hevur sent skriv til Fuglafjarðar kommunu 19. januar 2022, har víst verður til fyribils byggiloyvið, og um reinsiskipanin er innanfyri hetta loyvi. Víst verður á tilboð frá Purenviro uppá luftreinsiskipanina, sum varar í eina viku. Havsbrún spyr, hvussu sleppast kann víðari í hesi verkætlan.<br>Tekniska deild svarar í teldubrævi tann 21. januar, at neyðugt er at biðja um byggiloyvi til reinsiskipanina. Tí varð innkallað til fund, har Havsbrún kunnar um verkætlanina.<br><br>**Fyrireikingar til reinsiskipan fyri fóðurdeild**<br>Havsbrún vísti á, at ikki ber til at síggja fyri sær allar framtíðaravbjóðingar í sambandi við fyrireikingarnar av verkætlanini. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Stálprísirnir eru t.d umráðandi fyri verkætlanina, tí teir skifta støðugt. Tilboðið uppá reinsiskipanina varar í eina viku, og leveringstíðin er ½ ár. Neyðugt er at taka eina skjóta avgerð í hesum máli, og í seinasta lagi á býráðsfundinum 24 feb. 2022. Gongur hetta ikki, má verkætlanin helst bíða eitt ár.<br>Havsbrún hevur vitjað aðrar fóðurfabrikkir, sum hava somu luktreinsiskipan.<br>Veðrið spælir ein stóran leiklut í sambandi við uppsetan av skorsteini.<br>Havsbrún hevur brúkt bestu fólkini bæði innan- og uttanhýsis, til at finna bestu loysnina fyri at taka luktin úr roykinum.<br>Umboð fyri Havsbrún nýttu høvi til at vísa á tvey kort yvir Fuglafjørð. Eitt undir núverandi støðu, sum vísir indensitetin á luktdálkingini, og eitt kort, eftir at reinsiskipanin er gjørd liðug fyri verandi fóðurlinju 1 og 2<br><br>**Sjálv Renisiskipanin**<br>Eftir drúgvar kanningar, so valdi Havsbrún at leggja seg eftir eini skrubbaraskipan fram um biofiltur, carbonfiltur, brenning av luft, bæði tá hugsa verður um stødd av anleggum, rakstrarútreiðslur og effektiviteti.<br>Umboð fyri Havsbrún greiddi frá, at sjálv reinsiskipanin til linju 1&2 er ein skrubbari og ein skorsteinur. Neyðugt verður við einum scrubbara afturat til linju 3. Skrubbararnir taka 95 % av luktinum, meðan skorsteinurin flytur luftútlátið upp á 75 m hædd. Til eitt skrubbaraanlegg hoyrir altíð ein skorsteinur. Í núverandi støðu eru tvær fóðurlinjur, og arbeitt verður við at gera eina fóður linju 3. Ein skrubbari verður settur til verandi framleiðslu, og ein til fóðurlinju 3, tá hon kemur so langt, og ein til framtíðartørv.<br>Hvør skrubbari er 7 m í diametur, og umleið 13 – 15 m høgir. Skorsteinurin er 3,5 m í diametur, og 75 m høgur. Kravið til hæddina á skorsteininum hevur nakað við ferð og luftmongd at gera. Við fóðurlinju 3 økist framleiðslan eini 90 %.<br>Luft sum kemur frá t.d. turkunum og kølarum verður savna saman og blástt inn í skrubbarin, har sjógvur rennir niður yvir biomedier, har luft kemur upp ígjøgnum, og reinsar luktin úr luftini, áðrenn hon fer út í fría luft.<br>Tá lendið rundanum er slætt, so er skorsteinurin lægri, men til eitt lendi sum í Fuglafirði, er neyðugt at fara upp á 75 m høgan skorstein, um skipanin skal virka optimalt. Hægri skorsteinur , betri fortynning.<br>Umboð fyri Havsbrún greiddi frá dimensioneringini av skorsteininum, um eginfrekvens, frekvens á vindbelastninginum og mátar at tálma svingningum í skorsteininum, soleiðis at svingningurin frá vindbelastninginum ikki rakar eginsvingningin í skorsteininum.<br><br>Nýggja vaskitornið og skorsteinurin er til verandi fóðurframleiðslu, men skorsteinurin og fundamentið er fyrireika til framtíðarútbyggingar av linju 3. |

| | |
|---|---|
| | Eisini arbeiðir Havsbrún við at minka um vansarnar av ljóði, hetta við at skifa bygningslutir út frá stáli til betong og bjálving annars.<br>Umboð fyri Havsbrún nevndi, at fóðurdeildin koyrir javnt og samt, og tað er luftútlátið frá fóðurdeildini, sum málið nú snýr seg um.<br><br>**Eftirlit**<br>Umboð fyri Havsbrún nevndi, at Havsbrún er undir eftirliti av Umhvørvisstovuni og Heilsufrøðisligu starvsstovuni. Havsbrún hevur valt tað bestu loysnina til at reinsa luktin úr luftini, og tað er luftvasking, sum er tann besta loysnin, tí Havsbrún liggur í einum fjallaumhvørvi.<br><br>**Málsviðgerð á teknisku deild og politisk viðgerð**<br>Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu vísti á, at ein visualisering er ein fortreyt fyri at lýsa málið væl politiskt, og eisini við atliti til borgarar.<br>Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu nevndi í hesum sambandi, at nógvir partar hava áhuga í eini so stórari verkætlan, bæði tey, sum eru fyri, og tey sum eru ímóti verkætlanini.<br>Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu nevndi eisini, at tað eru týðandi broytingar gjørdar í verkætlanini, síðani prinsipiella byggiloyvið varð givið, eisini tí er neyðugt við einari umsókn um byggilovvi, og einari verkætlanarlýsing við øllum neyðugum og viðkomandi tilfari.<br>Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu nevndi tað sera týdningarmikið, at Havsbrún søkir um byggiloyvið saman við viðkomandi tekningum og útrokningum av skorsteini og fundamentum, hetta sambært prinsipiella byggiloyvinum frá 27. august 2020, soleiðis at tekniska deild kann viðgerða málið rætt. Eisini við atliti til, um søkt verður um alment innlit í málið.<br>Víst verður eisini til svarskriv hjá teknisku deild, dagfest 21. januar 2022, uppá fyrispurning frá umboð fyri Havsbrún, um reinsiskipanin liggur innanfyri prinsipiella byggilovvið frá 31. august 2020, sí FK j. nr. 20/00338-5.<br>Umboð fyri Havsbrún vísir á, at leiðslan er sera spent uppá at byrja uppá reinsiskipanina, og fáa hana lidna til komandi summar, soleiðis at vit fáa eitt reinsað luftútlát í heyst.<br>Umboð fyri Havsbrún vísti á týdningin, at málsviðgerðin var smidlig og skjót, og at FK hugsaði seg um, tá biðið verður um ymsar útrokningar, sum eins væl kundu verið tryggjaðar í víðari málsviðgerðini. Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu tók undir við hesum og segði, at hetta hevði verið leiðsturin, sum arbeitt hevði verið eftir.<br><br>**Málsviðgerðin í Fuglafjarðar kommunu - Tíðarætlan**<br>Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu vísti á, at tekniska deild má hava nakrar dagar at viðgerða umsóknina um byggiloyvið til nýggju reinsiskipanina. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Málið verður fyrst viðgjørt í vinnu- og havnanevndini 11. februar 2022. Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu nevndi í hesum sambandi, at viðgerðin kundi útsetast nakarar dagar. Soleiðs at Havsbrún hevði nakrar dagar eyka at prosjektera í.<br>Málið verður viðgjørt í býráðnum 24. februar 2022.<br><br>**Niðurstøða**<br>1. Umsókn frá Havsbrún við tekningum og útrokningum 10. februar<br>2. Statiskar berokningar uppá skorstein og fundamentir at lata teknisku deild<br>3. Havsbrún ger eina visualisering, har tekniska deild nágreinar, á hvørjum staði visualiseringin skal gerast frá, eftir ynski frá umboð fyri kommununa<br>4. Nevndarfundur hjá Havsbrún verður 17. februar<br>5. Vinnu- og havnanevndarfundur 8. februar við møguleika til útsetan í nakrar dagar fram<br>6. Býráðsfundur 24. februar, har miðja verður eftir at málið verður avgreitt.<br>7. Umboð fyri Fuglafjarðar kommunu bað umboð fyri Havsbrún, venda aftur til Fuglafjarðar kommunu skjótast gjørligt við einari umsókn um byggiloyvi, og einari verkætlanarlýsing, sum inniheldur í minsta lagi hesi viðurskifti:<br>a. Tekningar og statiskar berokningar upp á skorstein og fundamentir<br>b. Visualisering av reinsiskipanini, herundir skorsteini og fundamentum<br><br>**Ásetingar í byggisamtyktin fyri havnaøkið eru hesar**<br><br>1. Økið verður lagt av til havnarøki endamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu.<br><br>2. Byggistigið fyri havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,8. Hæddir á húsum skulu verða settar í hvørjum einstøkum føri út frá heildarmeting av nýtslu og skapi.<br><br>3. Í niðastu hædd er ikki loyvt at inrætta skrivstovur, |

| | |
|---|---|
| | umklæðingarrúm, matstovur, køk, o. t..<br><br>4. Inn frá sunnara parti á havnarøkinum verða goymsluhallir gjørdar inni í fjallinum.<br><br>5. Bygging má ikki verða nærri bryggjutrom enn 15 m. Tá serligar orsøkir tala fyri hesum, kunnu smærri bygningar til serserstaka pumu-, krana- og flutningsúrgerð verða nærri bryggjutrom enn 15.<br><br>6. Mest loyvda hædd á bygningum er 15 m. Tá serligar orsøkir tala fyri tí, kunnu silobygningar, goymslutangar og bygningar til serstaka maskinútgerð á økinum frá Kirkjuryggi og suðureftir, sum krevja meira hædd og sum strekkja seg yvir eitt ávíst lutvís minni øki verða hægri enn 15 m.<br><br>Atlit til útsjónd og lit skulu takast til skorsteinin, sum kommunan kann góðtaka.<br><br>Tekniska deild hevur gjøgnumgingið umsóknina um byggiloyvið til reinsiskipan. Tað eru plantekningar, tvørskurðir, útrokningar og visualisering.<br><br>Umsóknin um **treytað** byggiloyvi til reinsiskipan liggur innanfyri tær ásetingar í byggisamtyktini, sum eru galdandi fyri økið merkt D, norðanfyri Kirkjurygg.<br><br>Talan er um treytað byggiloyvi sambært § 10, stk. 4 í byggilógini, sum er soljóðandi:<br><br>**§ 10.** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

*Stk. 4.* Letur kommunali byggimyndugleikin umsøkjara eitt treytað byggiloyvi, skal tað í loyvinum týðiliga vera ásett, hvørjar treytir tað snýr seg um við tilvísing til heimildargrundarlagið.

Týdningarmikið er tí við greiðum treytum við tíðarfreistum, um vinnu- og havnanevndin og býráðið skulu góðkenna eitt treytað byggiloyvi til luftreinsuskipanina hjá Havsbrún sambært § 10, stk. 4 í byggilógini.

**Treytirnar eru hesar**

1. Høvuðsprosjekt við útgreinaðum statiskum útrokingum, sum liggur til grund fyri treytaða byggiloyvinum, skal verða teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi tann 1. mai 2022
2. At verkætlanin verður gjørd í samráð við teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu
3. Fuglafjarðar kommuna verður hildin skaðaleys í sambandi við arbeiðið

**Ískoyti til býráðsfundin 24. februar 2022**
Vinnu- og havnanevndin hevur viðgjørt umsóknina frá Havsbrún um treytað byggiloyvi til vaskitorn og ein skorsteinur skulu setast upp til eina reinsiskipan av luftútlátinum.
Vinnu- og havnanevndin samtykti at geva Havsbrún eitt treytað byggiloyvi sambært umsókn um treytað byggiloyvi, dagfest 9. februar 2022, sí FK j. nr. 22/00117-1 og 7, har treytirnar eru skrivaðar upp undir punkt 1, 2 og 3.

| | |
|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Umsókn um luftreinsiskipan til fóðurframleiðslu. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 22/00117-1 Havsbrún søkir um byggiloyvi til luftreinsiskipan til fóðurframleiðslu<br>FK j. nr. 22/00117-7 Havsbrún – Statiskar útrokningar og visualiseringsmyng nr. 4<br>FK j. nr. 22/00117-9 Havsbrún – Statiskar útrokningar, fundament frá P/f LBF |

Viðgerð

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at geva **treytað** byggiloyvi til luftreinsiskipan í sambandi við verandi fóðurframleiðslu sambært umsókn um treytað byggiloyvi, dagfest 9. februar 2022, frá Havsbrún, sí FK j. nr. 22/00117-1 og 7, við omanfyri nevndu treytum, punkt. nr. 1, 2 og 3.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 24. Februar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við samtyktini hjá vinnu- og havnanevndini um at geva treytað byggiloyvi sambært umsókn um treytað byggiloyvi, dagfest 9. Februar 2022, frá Havsbrún, sí FK j. nr. 22/00117-1 og 7, og statiskum útrokningum frá P/f LBF av fundamentinum, sí FK j. nr. 22/00117-9. |
| Dagf | 11 februar 2022. |

**Vinnu- og havnanevndin 11. februar 2022:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um at geva treytað byggiloyvi til luftreinsiskipan í sambandi við verandi og komandi fóðurframleiðslu sambært umsókn um treytað byggiloyvi, dagfest 9. februar 2022, frá Havsbrún, sí FK j. nr. 22/00117-1 og 7, við omanfyri nevndu treytum, punkt 1, 2 og 3.

**Treytirnar eru hesar** 

1. Høvuðsprosjekt við útgreinaðum statiskum útrokingum, sum liggur til grund fyri treytaða byggiloyvinum, skal verða teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi tann 1. mai 2022
2. At verkætlanin verður gjørd í samráð við teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu Fuglafjarðar kommuna verður hildin skaðaleys í sambandi við arbeiðið

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið deildi seg í tvey í hesum máli. 6 býráðslimir atkvøddu fyri málinum; tað gjørdu Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð og Gudny Vang. 2 býráðslimir atkvøddu ímóti, tað vóru Sonni á Horni og Ólavur Larsen. Býráðið samtykti tískil 6-2, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini, og veita P/f Havsbrún treytað byggiloyvi til luftreinsiskipan sambært teimum treytum, sum vinnu- og havnanevndin setti á fundi tann 11. februar 2022.

**11/22**
**21/00432-5 Dánjal Pauli Højgaard - Umsókn um byggiloyvi til útbyggjan og bilhús , matr. nr. 505a**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.02.2022 | 21/22 |
| 2 Býráðið | 24.02.2022 | 11/22 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
| Stutt lýsing av málinum | Nýrúm við Einar Toftegaard hevur vegna Dánjal Paula Højgaard send umsókn inn til kommununa um byggiloyvi til bilhús á ognini, matr. nr. 505a, Fuglafjørður.<br>Sambært byggisamtyktini má bilhúsið ikki greinsa ímóti granna meira enn 8 m ein veg, og 4,5 m móti granna annan vegin.<br><br>Umsøkjarin hevur ynski um at fáa loyvi til at byggja bilhúsið sambært dagførdum tekningum, sí FK j. nr. 21/00432-3.<br>Hetta viðførir, at her má grannahoyring til og viðgerða málið sum eitt frávik.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 24. februar 2022**<br>Eftir at hava tosað við Nýrúm, sum umboðar eigaran, so ynskir hann at halda fast í umsóknina, sí FK j. nr. 21/00432-1, men broyta tvørskurðin sambært dagførdum tekningum, sí FK j. nr. 21/00432-3, har takið á bilhúsinum er lyft upp umleið 1 m yvir veghædd í niðara borð, hetta fyri at børn ikki skulu ganga beinleiðs oman á tekjuni á bilhúsinum.<br>Tá málið fer til grannahoyringar, so verður tað við støði í uppruna umsókníni, men við dagførda tvørskurðinum.<br>Talan er um trý frávik. Longdin á bilhúsi niðan ímóti vegnum er 1 m ov long, longdin ímóti granna er 2,6 ov long, og hæddin er meira enn 2,5 m í hædd. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Umsókn um byggiloyvi til bilhús á ognini, matr. nr. 505a, Fuglafjørður. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00432-1 Umsókn um byggiloyvi til bilhús<br>FK j. nr. 21/00432-3 Nýrúm - Dagførdar tekningar<br>FK j. nr. 21/00432-7 Yvirlitstekning av matr. nr. 505a, Fuglafjørður |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at vit halda okkum til byggisamtyktina.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 24. februar 2022**<br>Tekniska nevnd hevur samtykt at geva undantaksloyvi við tí fráviki, at longdin á bygninginum niðan ímóti vegi er 9 m, har loyvt er at byggja 8 m, og at geva frávik ímóti granna eystureftir, har longdin er 7 m, har loyvt er at byggja 4,5 m, og at geva loyvi til dagførda tvørskurðin, har ovara síða á bilhúsinum er lyft upp við einum metri.<br>Eitt triðja frávik er eisini, at hæddin á bilhúsinum er hægri enn 2,5, tá bygt verður nærri enn 2,5 m frá grannamarki.<br>Tekniski leiðarin mælir til at senda málið til grannahoyringar í økinum omanfyri og eystan fyri ongina, matr. nr. 505a, eftir at málið hevur verið viðgjørt í býráðnum. | | |
| Dagf | 17. februar 2022. | | |

34

**Tekniska nevnd 17. februar 2022:**

Nevndin samtykti at ganga umsóknini á møti við einum fráviki, tí longdin á bygningi ímóti grannamarki niðan ímóti vegi er meira enn 8 m, og longdin á bygningi ímóti granna fyri eystan er meira enn 4,5 m. Málið verður lagt fyri býráðið, og síðani verða grannarnir hoyrdir.

**Býráðið 24. februar 2022:**

Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og veita umsøkjaranum byggiloyvi til bilhús á matr.nr. 505a við fráviki og við kravi um góðkenning frá grannum umvegis teknisku umsitingina. Býráðið samtykti samtíðis, at heita á teknisku nevnd, um at gera møguligar tillagingar í byggisamtyktini, sum hevur við tær ásetingar í byggisamtyktini, sum hetta mál snýr seg um.

## 12/22
## 22/00054-10 Sp/f Svalir við John David Joensen - Umsókn um grundøkið, matr. nr. 211r, Fuglafjørður, og fyrispurningur um møguleikar fyri bústaðarbygging og íbúðarbygging í Fuglafjarðar Kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.02.2022 | 13/22 |
| 2 Býráðið | 24.02.2022 | 12/22 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Sp/f Svalir hevur latið umsókn inn til umsitingina um keyp av grundøki, matr. nr. 211r, Fuglafjørður.<br>Eisini verður spurgt um møguleikar fyri býstaðarbygging og íbúðarbygging í Fuglafjarðar kommunu.<br>Umsitingin hevur havt ein innleiðandi fund við Svalir, har fleiri møguleikar vóru umrøddir um at byggja seks íbúðareindir á einum grundøki hjá Fuglafjarðar kommunu.<br>Umsitingin vísti Sp/f Svalir á eitt grundøki, matr. nr. 211r, sum er 611 fermetrar til støddar.<br>Matrikul nr. 211a, umleið 227 fermetrar, er ogn hjá Fuglafjarðar kommunu. Verður hesin matrikul lagdur saman við 211r, so verður grundøkið 838 fermetrar til støddar. Harvið er møguleiki fyri at gera seks íbúðareindir á samlaðu grundstykkjavíddini. Ein búeind fyri hvørjar 75 fermetrar. Byggiprosentið kann verða 0,6. Matr. nr. 211a er hugsaður til at brýka sum perkeringsøki.<br>Eisini er møguleiki fyri at víðka grundøkið oman ímóti vegnum suðureftir.<br><br>Umsitingin hevur gjørt eina yvirlitstekning við 8 parkeringsplássum.<br><br>Ætlanin er at grava grundstykkið út og gera tað byggibúgvið.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 24. februar 2022**<br>Tekniska samtykti á fundi 17. februar um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 211r og parti av matr. nr. 211a, umleið 253 fermetrar, og leggja nevndu matriklar saman í eitt matrikulnummar, og víðka matr. nr. 211r oman ímóti vegnum suðureftir við 1,23 m, soleiðis at matr. nr. 211r verður 649 fermetrar til støddar, og broyta byggisamtyktina til eisini at umfata íbúðareindir, sum kunnu matrkulerast frá. Samlaði matrikulin verður tá 902 fermetrar. Eisini samtykti nevndin at leggja málið út til almenna hoyring og eftirlits. |

35

| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Fyrispurningur frá Sp/f Svalir um møguleikar fyri bústaðar- og íbúðarbygging í Fuglafjarðar kommunu. | |
|---|---|---|
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin og BK 17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 22/00054-9 Plantekningar, skurður og 3D-myndir<br>FK j. nr. 22/00054-12 Yvirlitsteking av matr. nr. 211r og 211a | |
| Viðgerð | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at matrikulera matr. nr. 211r og 211a saman í ein matrikul, og at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 211r soleiðis, at tilber at byggja 6 íbúðareindir, og at leggja broyting av byggisamtyktini út til allmenna hoyring og eftirlits.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 24. februar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir til, at býráðið tekur undir við samtyktini í teknisku nevnd 17. februar 2022 um at matrikulera part av matr. nr. 211a saman við matr. nr. 211r, og broyta byggisamtyktina fyri økið til eisini at umfata íbúðarbygging, víðka part av matr nr. 211r oman ímóti almennum vegi, og at leggja broytingina av byggisamtyktini út til almenna hoyring og eftirlits. Eisini samtykti nevndin at marknaumskipa part av matr. nr. 211a, umleið 11,5 fermetrar, til litra økið, matr. nr. g, Fuglafjørður, sum er vegaøki.<br>Eisini verður mælt til, at eitt øki, sum svarar til 5 parkeringspáss, umleið 50 fermetrar, verður matrikulera frá matr. nr. 211a til litraøki, matr. nr. g, Fuglafjørður. | |
| Dagf | 17. februar 2022. | |



**<u>Tekniska nevnd 17. februar 2022:</u>**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og leggja part av matr. nr. 211a saman við matr. nr. 211r, og broyta byggisamtyktina fyri samlaða matrikulin, og leggja broytingina út til almenna hoyring og eftirlits. Matr. nr. 211r verður víðkað oman ímóti almennum vegi.
Partur av matr. nr. 211a verður at leggja saman við matr. nr. 211h, fyri at fáa innkoyringina í lagi. Hetta skal gerast í samráð við eigarin av matr. nr. 211h.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, at leggja saman matriklarnar 211a og 211r og broyta byggisamtyktina fyri samlaða matrikkulin, og leggja broytingina út til almenna hoyring og eftirlits. Í hesum sambandi góðkendi býráðið eisini, at partur av matr.nr. 211a verður lagdur saman við matr.nr. 211h í samráði við eigaran av matr.nr. 211h.

37

# 13/22
# 21/00246-2 Vatngoymslutangi_Staðseting á havnalagnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.04.2021 | 17/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 20.08.2021 | 27/21 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 17.09.2021 | 39/21 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 12.11.2021 | 46/21 |
| 5 Býráðið | 25.11.2021 | 45/21 |
| 6 Býráðið | 24.02.2022 | 13/22 |
| 7 Vinnu- og havnanevndin | 11.02.2022 | 7/22 |

## Tilráðing



<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td>Vinnu- og havnanevndini.</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing</td><td>Í sambandi við, at tað til tíðir er trupult at veita nokk av vatni til skipini, so hevur vinnan eitt ynski um at gera ein goymslutanga á havnaøkinum, soleiðis at skip kunnu fáa vatn umborð beinleiðis úr tanganum. Talan er um sóttreinsað vatn frá tí kommunalu drekkivatnsveitingarskipanini.<br><br>Staðseting og stødd á goymslutanga<br>Tá hugsað verður um staðseting, so er møguleiki fyri at staðseta ein goymslutanga á økinum við kaihúsið við endan av bygninginum hjá Havsbrún.<br>Kommunan ynskir at tangin ikki kemur upp um takið á bygninginum.<br>Vinnan hevur tørv á einum goymslutanga á umleið 1.400 m3.<br><br>Góðskutrygd<br>Tá kommunan hevur latið vatn í goymslutangan, so tekur vinnan yvir og hevur ábyrgdina av vatngoymsluni og góðskuni av vatninum, áðrenn tað kann latast skipunum.<br>Tá talan er um ein goymslutanga aftaná sóttreinsingarskipanina, so mugu ymisk atlit verða tikin í mun til góðskuna á vatngoymsluni. Ein tílíkur tangi kann skapa gróðrarlíkindir fyri bakterium av ymiskum slagi. Ein slík vatnveitingarskipan skal góðkennast av Heilsufrøðisligu starvsstovuni. Eisini mugu mannagongdir gerast í sambandi við at tryggja vatngóðskuna.</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | **Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 20. august 2021**<br>Avtalað er, at verkfrøðingur kommununar saman við formanninum í vinnu- og havnanevndini taka fund upp við Havsbrún í sambandi við manglandi vatnforsýning til havnaøkið.<br>Málið um størri vatngoymslu hevur verið fyri í teknisku nevnd áðrenn summarferiuna, har umsitingin móttók tilboð frá føroysku veitara uppá ávikavist tveir betongvatngoymslur á umleið 1.400 tons hvør, og ein betongvatngoymslutanga á 3.000 tons. Tá er ventilrekkja og planering ikki við í kostnaðinum.<br>Tosað varð eisni á fundinum um møguleikan við at leggja eina leiðing við sóttreinsaðum vatni frá verandi vatngoymslu og yvir til havnaøkið eftir botninum, soleiðis at kain fekk separata forsýning uttanum býin.<br><br>Umsitingin hevur enn einaferð fingið umsókn frá Havsbrún um at fáa loyvi til at staðseta eina vatngoymslu á umleið 1.400 tons á kaiøkinum t.d. við havnaskrivstovuna. Hendan staðseting er tann skilabesta fyri Havsbrún. Tangin er 14, 2 m í útvendigum diametri, og 10 m høvur.<br>Tankin hjá Havsbrún er at leiða reinsa vatn í tangan frá kommunalu vatnveitingni, og skipa soleiðis fyri, at tað altíð er útskifting í vatntanganum, soleiðis at bakteriur ikki kunnu nørast.<br>Víst verður til tilboð frá Havsbrún uppá ein vatntanga á kr. 1.885,- u/mvg, og uttan planering og botn. Helst hevði samlaði kostnaðurin fyri hesa vatngoymslu verði kr. 2.3 mill.<br>Havsbrún leggur áherðslu á, at tað er sera týdningarmikið fyri virksemið hjá teimum at kunna veita sóttreinsa vatn og tað tænastu, sum skipini treingja.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanvendini 17. september 2021**<br>Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum í sambandi við umsókn um loyvi frá Havsbrún at staðseta ein 1.400 tons vatntanga á økinum við havnaskrivstovuna.<br>Havsbrún bjóðar Fuglafjarðar havn frystihøllina og øki rundanum hana til virksemið hjá Fuglafjarðar havn, soleiðis at pláss verður fyri havnaskrivstovu og goymslu til øll amboðini, sumí dag standa úti í saltrákanum og verða oyðilogd.<br>Havsbrún hevur eitt sterkt ynski um at fáa hesa vatngoymslu á havnalagnum, hetta fyri at servisera skipini, sum koma til kai í Fuglafirði. Hetta fer eisini at tryggja inntøkumøguleikar hjá Fuglafjarðar havn og tryggja verandi góða tænastustøði á havnalagnum.<br>Eisini mælir umsitingin til at fáa gjørda eina virðismeting av frystigoymsluni og av verandi havnaskrivstovu, sum skal verða grundarlag fyri einum býtishandli millum Havnsbrún og Fuglajfarðar havn, og gera eina kostnaðarmeting av at gera eina nýggja havnaskrivstovu í frystigoymslubygninginum H&F.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 12. november 2021** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Tekniska deild hevur saman við havnastjóranum arbeitt víðari við eini heildarætlan, har arbeitt hevur verið við eini nýggjari staðseting av skrelliplássinum hjá Fuglafjarðar havn.<br>Tað hevur við sær, at plássið uttanfyri havnaskrivstovuna er tøkt til ein vatntanga á økinum.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 25. november 2021**<br>Málið hevur verið viðgjørt í vinnu- og havnanenvdini 12. ovember 2021. Nevndin heldur ikki, at staðseting av vatntanga á kaini er ein góð loysn, men tá nevndin í Bakkafrost, í fylgi stjóranum á Havsbrún, ikki er sinnað at finna aðraa loysn, samtykti nevndin at ganga umsóknini á møti við tí treyt, at talan er um eina fyribils loysn. Vatnið, sum verður veitt til virkini, verður eftir galdandi takstum, og Fuglafjarðar havn fær inntøkurnar eftir galdnandi takstum, sum fara yvir kaikant.<br>Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur av vatntanganum. Vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.<br>Við í avtaluni er gamla frystihúsið hjá Handils- og Frystivirkinum, har Fuglafjarðar havn fær rakstrargøgnini undir tak.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 27. januar 2022**<br>Umsitingin hevur saman við løgfrøðingi kommununar gjørt uppskot til leigusáttmála um leigu av lendi, matr. nr. 239a, Fuglafjørður, frá Fuglafjarðar kommunu. Víst verður til FK j. n. 21/00246-16.<br>Leigusáttmálin tekur hædd fyri, at tað verður samsvar millum leigusáttmálan og umsitingarliga byggiloyvið til vatngoymslutangan, tá verkætlanin kemur hartil.<br><br>Havsbrún hevur fingið leigusáttmálan til ummælis.<br><br>Víst verður til skriv frá fundinum í býráðnum 25. november 2021, har Havsbrún verður biðið at koma við eini umsókn um umsitingarligt byggiloyvi við tilhoyrandi tekningum og útrokningum. Neyðugt er at taka atlit til verandi leiðingar í kaini, har sum vatngoymslutangin kemur at verða staðsettur. Eisini er neyðugt, at verkætlanin verður gjørd í samráð við havnastjóran og teknisku deild, soleiðis at arbeiðið kann verða so væl planlagt sum gjørligt.<br><br>**Tíðarætlan**<br>Tá leigusáttmálin er undirskrivaður og góðknedur av býráðnum, so kann Havsbrún byrja uppá at gera høvuðsprosjektið, sum verður grundarlagið undir byggingini av vatngoymslutanganum. Havsbrún ætlar at byggja vatngoymslutangan so skjót tilber, soleiðis at hann verður klárur at taka í brúk tíðliga í summar. |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 11. februar 2022<br>Umsitingin hevur sent Havsbrún eitt tillagað uppskot til sáttmála 26. januar 2022, har SÓKN Advokatar saman við umsitingini hava gjørt. Víst verður til FK j. nr. 21/00246-28, sum Havsbrún ikki kann taka undir við.<br><br>Umsitingin hevur móttikið eitt dagført uppskot frá Havsbrún, sum bert snýr seg um vatntangan og við øðrum smærri broytingum. Hetta við støði í, at um Havsbrún og Fuglafjarðar kommuna ynskja seinni at makabýta, so kann hesin parturin takast upp aftur seinni.<br><br>Vinnu- og havnanevndin skal taka støðu til uppskot til broyting av sáttmála frá Havsbrún.<br><br>Ískoyti til fundin í býráðnum 24. februar 2021<br>Vinnu- og havnanevndin hevur á fundi 11. februar samtykt at taka undir við broyttum sáttmálauppskoti frá Havsbrún. Víst verður til FK j. nr. 21/00246-32.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Betri veitingartrygd av drekkivatni og tænastu til skip og virkir.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Byggisamtyktin og BK17<br>Heilsufrøðisliga starvsstovan_Lóg um vatngóðsku<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00246-1 Plantekning_Staðseting av vatngoymslutanga<br>FK j. nr. 21/00246-4 Havsbrún_Tilboð uppá betongvatngoymslutanga<br>FK j. nr. 21/00246-16 Leigusáttmáli millum F/f Havsbrún og Fuglafjarðar kommunu um leigu av lendi til vatngoymslutangan á parti av matr. nr. 239a, Fuglafjørður<br>FK j. nr. 21/00246-27 SÓKN Advokatar – Eyðbjørg Larsen – Tillagaður sáttmáli í samráð við kommunustjóran og tekniska leiðaran<br>FK j. nr. 21/00246-32 Havsbrún – Odd Eliasen – Dagført uppskot til leigusáttmála</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Nevndin mælir til, at tekniska deild arbeiðir víðari við málinum.</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 12. november 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at ganga umsóknini á møti, har Havsbrún fær loyvi til at staðseta ein vatngoymslutanga á havnaøkinum fyribils, inntil Fuglafjarð kommuna hevur útbygt sínar egnu vatngoymslutangar, soleiðis at Fuglafjarðar havn og býurin annars fær nokk av vatni. Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur hesum viðvíkjandi, og at Havbrún rindar sama kostnað fyri vatnið sum yvir kaikant til Fuglafjarðar havn, og at vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsu Frøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 25. november 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við samtyktini í vinnu- og havnanevndini 12. november 2021, sum er soljóðandi.<br>Nevndin heldur ikki, at staðseting av vatntanga á kaini er ein góð loysn, men tá nevndin í Bakkafrost, í fylgi stjóranum á Havsbrún, ikki er sinnað at finna aðra loysn, samtykti nevndin at ganga umsóknini á møti við tí treyt, at talan er um eina fyribils loysn. Vatnið, sum verður veitt til virkini, verður eftir galdandi takstum, og Fuglafjarðar havn fær inntøkurnar eftir galdnandi takstum, sum fara yvir kaikant.<br>Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur av vatntanganum. Vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.<br>Við í avtaluni er gamla frystihúsið hjá Handils- og Frystivirkinum, har Fuglafjarðar havn fær rakstrargøgnini undir tak.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 27. januar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við leigusáttmálanum millum Havsbrún og Fugljarðar kommunu, og at samsvar er millum leigusáttmálan og umsitingarliga byggiloyvið, tá umsókn um byggiloyvið við tilhoyrandi tekningum og útrokningum verður viðgjørt í teknisku umsitingini hjá Fuglajfjarðar kommunu.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 11. februar 2022.**<br>Tekniski leiðarin mælir vinnu- og havnanevndini til at gjøgnumganga dagført uppskot til leigusáttmála frá Havsbrún, og gera viðmerkingar, soleiðis at sáttmálin við viðmerkingum kann leggjast til býráðið til endaliga støðutakan 24. februar 2022.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 24. februar 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir til at avtaka býráðssamtyktina 25. november 2021, og mæla býráðnum til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála frá Havsbrún, sí FK j. nr. 21/00246-32, og at málið um makaskiftið millum kommununa og Havsbrún verður tikið upp til viðgerar seini. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 12. apríl 2020.<br>20. august 2021.<br>17. september 2021.<br>12. november 2021.<br>25. november 2021.<br>11. februar 2022. |
|---|---|

**Vinnu- og havnanevndin 16. apríl 2021:**
Nevndin samtykti, at umsitingin kannar møguleikan fyri at leggja ein nýggjan ø 200 mm vatnleiðing frá vatngoymsluni og oman í býin, soleiðis at vit tá fáa tveir ø 200 mm, sum koma at fóðra býin og kaiøkið, og at umsitingin kannar møguleikan fyri at gera ein goymslutanga úti á Innaradal.

**Vinnu- og havnanevndin 20. august 2021:**
Nevndin samtykti, at tekniska deild arbeiðir víðari við málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 17. september 2021:**
Í sambandi við umsókn frá Havsbrún um økið til lýsitangar, so hevur kommunan onki øki tøkt til skrelluplláss. Havnalagið má endurskoðast við eini heildarætlan.

**Vinnu- og havnanevndin 12. november 2021:**
Nevndin heldur ikki, at staðseting av vatntanga á kaini er ein góð loysn, men tá nevndin í Bakkafrost, í fylgi stjóranum á Havsbrún, ikki er sinnað at finna aðraa loysn, samtykti nevndin at ganga umsókníni á møti við tí treyt, at talan er um eina fyribils loysn. Vatnið, sum verður veitt til virkini, verður eftir galdandi takstum, og Fuglafjarðar havn fær inntøkurnar eftir galdnandi takstum, sum fara yvir kaikant.
Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur av vatntanganum. Vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.
Við í avtaluni er gamla frystihúsið hjá Handils- og Frystivirkinum, har Fuglafjarðar havn fær rakstrargøgnini undir tak.

**Býráðið 25. november 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og geva Havsbrún loyvi til at staðseta ein 1.400 tons vatntanga á kaiini nærhendis havnaskrivstovuni, har talan er um eitt áramálssett fyribils loyvi, sum verður skrivað inn sáttmálan við Havsbrún.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Vinnu- og havnanevndin 11. februar 2022:**
Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála frá Havsbrún, og at sáttmálin verður lagdur fyri býráðið til endaliga støðutakan 24. februar 2022 umvegis løgfrøðing kommununar.

**Býráðið 24. februar 2022:**
Býráðið samtykti 5-3, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini, og taka av býráðssamtyktina frá 25. november 2021 viðvíkjandi somu viðurskiftum, og góðkendi fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og P/f Havsbrún um staðseting av 1.400 tons vatntanga á havnalagnum. Býráðið samtykti samtíðis, at P/f Havsbrún fær eitt treytað byggiloyvi í sambandi við bygging av vatntanganum, og at P/f Havsbrún í hesum sambandi skal venda aftur til teknisku deild hjá kommununi við einum endaligum myndugleikaprosjekti saman við einari umsókn um byggiloyvi. Fyri málinum atkvøddu Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen og Eivin Breiðaskarð. Ímóti málinum atkvølddu Sonni á Horni, Ólavur Larsen og Gudny Vang.

Fundurin lokin kl. 21:45

Gerðabókin lisin og góðkend.



Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

Eivin Breiðaskarð

Magni Jøkladal

Edva Jacobsen

Ólavur Larsen

Gudny Vang

45